

Jóannes Eidesgaard
*landsstýrismaður*

# Stýrisvalið og samsýningin til stýrislimirnar í Húsalánsgrunninum er væl grundað

Stýrislimirnir í Húsalánsgrunninum skulu til eina og hvørja tíð stýra og fáa Húsalansgrunnin at virka sambært tí løgtinglóg, sum Løgtingið hevur samtykt um grunnin. Samstundis skal samsýningin til stýrið vera rímilig, bæði við atliti at arbeiðsorku og við atliti at, hvat onnur líknandi stýrið fáa

Seinastu dagarnar hevur Miðflokkurin skuldsett landsstýrismannin í fíggjarmálum fyri at fremja valdsmisnýstlu við at velja flokskammeratar í almennan grunn við feitari løn. Hesar skuldsetingar eru púrasta burturvið og mugu tí staðiliga afturvísast.

Niðanfyri verður givin ein stutt frágreiðing um grundgevingarnar fyri at skifta meirilutan í stýrinum út og reguleringini í stýrissamsýningini.

Húsalánasgrunnurin er ein stovnir undir landinum, hvørs virksemið er regulerað við løgtingslóg. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur Húsalánsgrunnin sum málsøki og hevur sostatt eisini ábyrgdina av, at grunnurin til eina og hvørja tíð virkar sambært galdandi lóggávu. Stýrið fyri Húsalánsgrunnin skal tí eisini til eina og hvørja tíð stýra grunninum sambært tí løgtingslóg, sum Løgtingið hevur samtykt um Húsalánsgrunnin.

Áðrenn nýggja lógin um Húsalánsgrunnin varð samtykt í Løgtinginum, gjørdi fyrrverandi stýrið greitt, at tað fór ikki at bera til at fáa Húsalánsgrunnin at virka sambært nýggju lógini. Tá nýggja lógin um Húsalánsgrunnin varð samtykt var tí ikki annað at gera, enn at skifta meirilutan í stýrinum fyri Húsalánsgrunnin út. Ongin fer at geva nøkrum ábyrgdina at loysa eina uppgávu fyri seg, tá viðkomandi frammanundan boðar frá, at hetta fer ikki at bera til. At vera stýrislimur í Húsalángrunninum er ikki nøkur vanlig starvssetan, men ein álitissessur. Tí kunnu stýrislimir til eina og hvørja tíð verða skiftir út, um landsstýrismaðurin ikki longur hevur álit á teimum.

Miðflokkurin sigur eisini, at orsøkin til at tveir limir í stýrinum vóru skiftir út, er, at vrakaðu limirnir vóru ikki politiskt samdir við landsstyrismannin. Hetta kenni eg einki til. Hvørja politiska fatan stýrislimirnir í Húsalánsgrunninum hava er fullkomiliga líkamikið. Stýrislimirnir í Húsalánsgrunninum hava eina greiða uppgávu, teir skulu stýra grunninum og fáa grunnin at virka sambært tí løgtingslóg, sum Løgtingið hevur samtykt um Húsalánsgrunnin.

Nýggju stýrislimirnir eru valdir, tí teir vera mettir at vera væl skikkaðir at fáa Húsalánsgrunnin at virka sambært nýggju lógini og endamálinum. Tann eini hevur fyrr verið stýrisformaður í Húsalánsgrunninum og hevði tá líknandi ambitiónir við orkulánum. Hin limurin er valdur, tí hann hevur stóra fakliga vitan og drúgvar royndir á orkuøkinum.

Tað eru fleiri grundgevingar fyri at regulera føstu samsýningina til stýrið fyri Húsalánsgrunnin. Nýggja lógin um Húsalánsgrunnin er ein rammulóg, sum stýrið fyri Húsalánsgrunnin skal fáa av virka við m.a. at gera uppskot til kunngerðir og aðrar reglur. Hetta verður ein stór arbeiðsuppgáva hjá stýrinum, serliga tað fyrsta árið.

Tað hevur annars allatíðina verið ætlanin at hækka samsýningina til stýrið fyri Húsalánsgrunnin, tá ið grunnurin fekst at virka aftur. Stýrið fyri Húsalánsgrunnin hevur síðan 2003 javnan søkt um at fingið hækkað føstu samsýningina, men svarið hevur allatíðina verið, at einki verður gjørt við føstu samsýningina, so leingi arbeitt verður við at fáa grunnin at virka aftur.

Nú Húsalánsgrunnurin fer at virka aftur er fasta samsýningin til stýrið regulera soleiðis, at hon verður á leið tann sama sum stýrið fyri líknandi grunnar og stovnar hjá landinum fáa. Realurin er tann stovnurin hjá landinum, sum líkist Húsalánsgrunninum mest, har er fasta mánaðarliga stýrissamsýningin góðar 21.000,- kr. Fasta mánaðarliga samsýningin til stýrið fyri Húsalánsgrunnin á 16.000,- kr. er tí nakað minni enn fasta samsýningin til stýrið fyri Realin.

Fasta samsýningin til stýrið fyri Húsalánsgrunnin skal endurskoðast aftur um eitt ár.



Bogi Godtfred

# Tá Bogi fór til Brússel

Í seinnu helvt av nítiárunum fór eg eina ferð til Álands fyri Dag og Viku at vera hjástaddur, tá álendska sjálvstýrið fylti runt og dagurin skuldi hátíðarhaldast. Tað var Norðurlendska ráðharraráðið, ið beyð nøkrum norðurlendskum fjølmiðlum til Álands. Sjónvarpið var einasti føroyski fjølmiðil, ið varð boðin við, og hinir norðurlendsku vóru á sama hátt útvaldir: NRK í Noregi, SVT í Svøríki og YLE í Finlandi. Norðurlendska Ráðharraráðið man hava hildið, at tað var neyðugt at gjalda fyri ferðina, so stóra hátíðarhaldið kundi fáa umrøðu uttan fyri Áland.

Ferðin til Álands rann fram fyri meg, tá ferðin til Brússel gjørdist umrøðuevni í fjølmiðlunum. Vit høvdu ikki lent í ES høvuðsstaðnum, tá Dimma visti at siga, at Jørgen Niclasen hevði keypt sær fjølmiðlaumrøðu. Dimmu á baki kom Útvarpið við somu niðurstøðu. Munurin á Dimmalætting og Útvarpinum er, at útvarpsfólkini eru partur av somu tíðindadeild í Kringvarpinum, sum hevði sent meg til Brússel. Nú skal tað ikki skiljast soleiðis, at eg havi nakað ímóti, at tíðindaredaktiónin í Útvarpinum tekur málið upp. Men var eg í teirra stað, hevði eg spurt, um Jørgen Niclasen hevði keypt sær fjølmiðlaumrøðu, áðrenn eg gjørdi tað til ein "sannleika", sum umrøðan varð bygd á.

Undan ferðini til Brússel hevði eg fleiri ferðir havt granskingarsáttmálan FP7 til umrøðu í Degi og Viku. Og einaferð, tá tað var komið so langt, at undirskrivingin var í ljósmála, spurdi Jørgen Niclasen meg, um Dagur og Vika fór at vera í Brússel í samband við undirskrivingina.

Eg segði, at tað væntaði eg ikki. Hugsaði, at tá vit á Degi og Viku ikki vóru til so týðandi tiltøk sum veðurlagsfundin í Keypmannahavn í desember, ikki vóru á áhugaverdu tøkniráðstevnuni framman undan um grøna orku og heldur ikki vóru í Reykjavík 25. apríl í fjør til týdningarmesta altingsvalið í Íslandi í nýggjari tíð aftaná mótmælini og stóra skrædlið har – ja, so fóru vit neyvan til Brússel heldur.

Jørgen Niclasen nevnir við meg, at Uttanríkisráðið kundi goldið ferðina og uppihaldið, um Dagur og Vika hevði hug at vera við. At hann nevndi tað við meg, hevur neyvan verið at aðrari orsøk enn at eg hevði havt málið frammi í Degi og Viku. Jørgen Niclasen segði ikki, at hann vildi hava meg við, og boðini frá mær til redaktións-leiðsluna, tá eg kom aftur úr Tinganesi, vóru, at Jørgen Niclasen hevði boðið Degi og Viku til Brússel. Hinvegin var tað ikki so løgið, at eg fór. Eg hevði jú arbeitt við málinum.

Umframt undirskrivingina av sáttmálanum sá eg í ferðini møguleikan at fáa nakrar nýggjar myndir úr Brússel, myndir, sum myndasavn okkara so harðliga hevði brúk fyri. Býurin Brússel og umhvørvið, har ES heldur til, er ikki so lítið broytt síðani Edmund Joensen í síni løgmanstíð var á ES høvuðsborgini við Høgna Hoydal í hølunum. Høgni var tá tíðindamaður á Degi og Viku. So gamlar vóru tær "nýggjastu" myndirnar í savni okkara av Brússel. Líka til tann hósdagin 3. juni, tá vit við góðari hjálp frá Uttanríkisráðnum og fryntligum fólki á føroysku sendistovuni spelaðu ígjøgnum býin og royndu at fáa sum mest av myndum í kassan, áðrenn klokkan gjørdist trý og FP7 - granskingarsáttmálin - skuldi undirskrivast.

Áðrenn vit fóru, gjørdi eg Uttanríkisráðnum greitt, at vit sjálvsagt arbeiddu púra óheft – og um vit ikki gjørdu tað, so fóru vit ongan veg. Tað skuldu vera greiðar linjur, tí eg fór ikki at seta trúvirðið uppá spæl - hvørki tað hjá Kringvarpinum ella mítt egna. Kravið varð góðtikið treytaleyst.

### Kjarnin í málinum

Nú eru vit so komin til kjarnina í málinum. Eg haldi, at Kringvarpið átti at farið til Brússel - og átti sjálvt at borið kostnaðin. Eingin ivi um tað. Men hvat geri eg, tá Kringvarpið ikki ger tað og ikki fer avstað, hóast journalistiskar orsøkir tala fyri at fara? Røkja vit okkara skyldur betur, tá vit sita heima, enn tá vit taka av tilboðnum um at fáa ferðina goldna, so hyggjarar okkara síggja og hoyra tað, ið fyriferst?

Hevur Jørgen Niclasen keypt sær umrøðu, má eg vera tann, ið havi selt honum hana - við vælsignilsi frá leiðsluni á Tíðindadeildini í Kringvarpinum. Men eg síggi heilt øðrvísi upp á tað. Eg haldi, at Uttanríkisráðið gav Kringvarpinum og mær møguleikan at veita mínum hyggjarum eina tænastu, sum teir annars ikki høvdu fingið.

Eg haldi, at tey, ið finnast at avgerðini um at lata Uttanríkisráðið gjalda ferðina til Brússel, annaðhvørt tað er Dimmalætting, tíðindaredaktiónin í Útvarpinum, felagið Føroysk fjølmiðlafólk, Sjúrður Skaale ella John Johannessen, áttu at viðgjørt spurningin líka tráliga, um tað ber til at hava ein public service stovn sum Kringvarpið við journalistum á eini tíðindadeild, sum noyðast at sleppa endanum, tá søgurnar røkka út um landoddarnar.

Á sama hátt landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, sum finst at avgerðini, men einki sigur um umstøðurnar, sum gera, at tíðindafólk mugu sita heima, tá tey átttu at farið og verið til staðar. Seinasta dømið er ríkisfundurin í Skagen. Eigin føroyskur fjølmiðil var á nøgv umrødda tíðindafundinum aftaná, hóast stórmál sum stjórnarskipan Føroya og hvalaveiða høvdu verið til viðgerðar. Tað sigur alt um arbeiðsumstøður okkara í tí fjølmiðlinum, sum landsstýriskvinnan hevur evstu ábyrgdina av.

Kjakið um hvør rindar fyri hvønn og trúvirði í hesum sambandi er minst líka gamalt, sum eg sjálvur eri í journalistikki. Og niðurstøðuni eri eg samdur í: Vit skulu ikki lata onnur gjalda, men fara og sjálvi gjalda, tá journalistiskar orsøkir tala fyri, at vit fara. Men fara vit so, tá orsøk er at fara? Nei, tíverri, og tað er her, kinkur kemur í.

Kringvarpið átti ikki at verið farið til Brússel og latið Uttanríkisráðið goldið, siga Sjúrður Skaale, Helena Dam á Neystabø og John Johannessen. Hetta eru fólk, ið sita soleiðis fyri, at tey kunnu gera mun tá um ræður at skipa soleiðis fyri, at tað ber til at arbeiða sum journalistur her á landi.

Trupulleikin er ikki nýggjur. Tað veit John Johannessen, ið, meðan hann arbeiddi á Degi og Viku, var á vesturstrond Skotlands saman við leiðsluni á SEV og hugdi at alduorkuverkum. SEV rindaði ferðina - eisini fyri John.